**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1638.**
**Tíðarskeið: 7/9-14/9 - 2016**

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Lis Larsen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, hýsu og mathøgguslokki varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu, longu og blálongu.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit møttu upp á Magnusi mikukvøldið 7/9 kl 20:00, men fóru, vegna tekniskar trupulleikar, ikki avstað av Havnini fyrr enn 00:30. Tóku støðir hósdagin í norðara/eystara parti av bankanum og fríggjadagin mitt á bankanum. Leygardagin lógu vit bakk allan dagin vegna sera vánaligt veður. Sunnudagin tóku vit støðir suður/vesturi á bankanum og lógu aftur bakk meginpartin av mánadegnum vegna vánaligt veður. Týsdagin tóku vit støðir í eystara parti av bankanum. Tóku 24 góðkendar fiskistøðir og 10 CTD-støðir. Vóru á Havnini týskvøldið kl. 20:35.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av toski og upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Tað var framvegis sera lítið av toski (Talva 1), bert 17 toskar í 24 hálum. Í fjør fingu vit 37 toskar og í 2014 fingu vit 44 toskar. Tó er vert at leggja til merkis, at sum nakað nýtt fingu vit 4 smáfiskar (umleið 40 cm), 7 ”smáar” toskar (70 cm) og bert 6 ”vanligar” toskar (110 cm). Vit fingu nakað tað sama av upsa hóast 5 av teimum djúpastu støðunum ikki vórðu tiknar í ár. Hinvegin fingu vit munandi meira av hýsu enn í fjør og onnur ár, umleið 8 ferðir meira. Hetta var mest smá hýsa, sum eisini var at síggja í vár. Eisini kann nevnast, at tað var munandi meira hvalspýggja í ár enn í fjør. Magakanningarnar vístu, at tað var nógv til av bæði smáari og stórari nebbasild, meðan nøgdin av krabbadýrum var sera lítil. Hitin við botn lá millum 8 og 10,5 gradir, eins og í fjør, sum er umleið ein hálv grad kaldari enn annars hevur verið vanligt.

**Talva 1.** Veiða og nytrur og magar tikin á túri 1638 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| Fiskaslag | KG<br>24 hál | Nytrur | Magar | KG<br>29 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HYSA | 6675,287 | 288 | 89 | 1031,147 | 7,82 |
| HAVMUS | 1416,904 | | | 2317,267 | 0,74 |
| HVALSPYGGJ | 980,257 | | | 8,695 | 136,23 |
| GULLLAKSUR | 874,082 | | | 314,471 | 3,36 |
| UPSI | 478,383 | 96 | 43 | 469,415 | 1,23 |
| SVARTKJAFTUR | 467,436 | 1 | | 545,450 | 1,04 |
| GLYSUFISKUR | 374,892 | | | 234,897 | 1,93 |
| LOLIGO | 275,487 | | | 254,770 | 1,31 |
| S. VIVIPARUS | 245,704 | | | 376,514 | 0,79 |
| KNURRHANI | 229,216 | | | 243,473 | 1,14 |
| LONGA | 180,040 | 36 | 4 | 188,135 | 1,16 |
| SILVUR MURTUR | 136,637 | | | 92,642 | 1,78 |
| TOSKUR | 108,350 | 17 | 16 | 496,395 | 0,26 |
| GEODIA SP | 104,079 | | | | |
| GAMAL FISKUR | 88,939 | | | | |
| HAVTASKA | 70,939 | | | 96,539 | 0,89 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 65,099 | | | 121,496 | 0,65 |
| HVITINGUR | 57,564 | | | | |
| GLASKVOYSA | 50,262 | | | 28,831 | 2,11 |
| TUNGA | 38,296 | | | 25,474 | 1,82 |
| BROSMA | 32,575 | 7 | 1 | 45,350 | 0,87 |
| BLALONGA | 31,335 | 9 | 5 | 22,490 | 1,68 |
| S. MARINUS | 29,110 | | | 11,910 | 2,95 |
| SANDSPROEKA (LL) | 23,101 | | | 14,040 | 1,99 |
| MAKRELUR | 18,411 | | | 4,305 | 5,17 |
| AGNHOEGGUSLOKKUR | 17,662 | | | 21,725 | 0,98 |
| ASTERIIDAE | 16,236 | | | | |

| Fiskaslag | KG<br>24 hál | Nytrur | Magar | KG<br>29 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SKOETA(BATIS) | 14,930 | | | 32,090 | 0,56 |
| HVITINGSBRODIR | 9,827 | | | 21,339 | 0,56 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 8,793 | | | | |
| NEBBASKOETA | 6,150 | | | | |
| STREYMSILD | 2,980 | | | 7,863 | 0,46 |
| PORIFERA | 2,315 | | | | |
| KLINGRUSKOETA | 2,190 | | | | |
| MEDUSAHØVD | 1,560 | | | | |
| ALCYONIUM | 0,977 | | | | |
| PURPURIGULKER | 0,927 | | | | |
| S. MENTELLA | 0,900 | | | 2,715 | 0,40 |
| ACTINIARIA | 0,591 | | | | |
| HUMMARI | 0,520 | | | 0,135 | 4,65 |
| GAGGA(DEYD) | 0,400 | | | | |
| PHAKELLIA SP | 0,249 | | | | |
| GAGGUKRABBI | 0,217 | | | | |
| HOLOTHUROIDEA | 0,204 | | | | |
| NEBBASILD | 0,162 | | | 0,150 | 1,31 |
| GAGGA | 0,112 | | | | |
| SKRAMBUL | 0,110 | | | 82,275 | 0,00 |
| SVIMJIKRABBI | 0,098 | | | | |
| SOLASTERIIDAE | 0,064 | | | | |
| TILSAMANS | 13140,559 | 454 | 158 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1638d.doc”.



Petur Steingrund